gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Hugalig næmingakonsert í Vági



TÓNLEIKAUMMÆLI
*Martin Mouritsen*

Tað var hugaligt at hoyra næmingar í Suðuroyar Musikkskúla á konsertini í skúlanum í Vági hósdagin 31. mai. Væl av fólki var og lurtaði, og konsertin vardi næstan tveir tímar.

Stuttligt var at síggja røðina av næmingum hjá Ann Kristin Nilsson, tá ið tey saman spældu »Honkey Tonk« á klaveri og tveimum ljómborðum. Her var tann sosiala dimensiónin tikin við í klaverundirvísingina.

Blokkfloytur, floytur og klarinettir úr øllum plássum í oynni spældu saman, og lærari teirra, Oddur Hentze, hevði undirspæl á klaveri. Tey eru rættiliga stinn, og tað er merkisvert, at nógvir musikkskúlanæmingar eru á smærru plássunum í Suðuroynni, og ikki minst, at allir næmingar í Fámjin ganga í musikkskúla.

Næmingar av Tvøroyri og úr Vági leiktu saman á





*– Stuttligt var at síggja røðina av næmingum hjá Ann Kristin Nilsson spæla, sigur Martin Mouritsen í ummælinum*

messingljóðføri og framførdu »Amazing Grace«. Steven Foggin hevur verið lærari hetta árið, og nú er so mikið væl áliðið, at rættulig ferð helst kemur á næsta skúlaár. Børnini hava hegni og eru spent at sleppa á pallin at leika fyri foreldrum, avvarðandi og hinum bíðandi næmingunum.

Brandur Enni á kornet og Tóra Vestergaard á klaver høvdu sjálvstøðugt og framkomið samanspæl. Tey bæði eru nú rættiliga von við at verða á palli, so áhoyrarin kann slappa av og njóta tónleikin.

Tóra leikti uttan hóvasták í hesum undirspæli, og tað gjørdi hon eisini, tá hon seinni spældi eina Adagio einsamøll. Brandur Enni hevur góðan og støðugan tóna og serliga kenslusama blásing, sum fær áhoyraran at lurta.

Gittarsamanspæl við næmingum í ymiskum aldri var sera sannførandi. Lærarin, Ólavur Jakobsen, hevði sett saman hóskandi tónleik har leiklutirnir passa hvørjum einstøkum næmingi.

Tey trý stykkini, Eight Days a Week, Blinkstra og Djingalla fyri fýra gittarar, ljóðaðu væl.

Einaleikur á trummusetti kann stundum verða møtimikil kostur hjá áhoyrarum, men hendan dagin komu leikararnir væl frá framførslunum; har var ikki bara sláttur, men eisini tónleikur í passaligari styrki.

Nógvir klaverleikarar, smáir og størri, leiktu einaleik á flyglið. Ljóðførið sjálvt hevur skjótt tænt sínum endamáli, og er ein loysn á vegnum, men í framtíðini í Vági, verður helst neyðugt at fáa eitt enn betur ljóðføri, so at til ber hjá øðrum at hava konsertir á staðnum. Tað darvaði tó ikki teimum nógvu næmingunum at spæla stykkini Tín miskunn, Svunnen Lycka, Syngja sama lag, Candle, Tambalaia, La Bamba, Adagio, Elise hjá Beethoven ella Air eftir Bach.

Spennandi verður at síggja, hvussu næsta árið fer at hilnast á ymisku plássunum í Suðuroynni, og ikki minst í hvønn mun samanspælið kemur at virka.

# Eitt klípi í siðsøguliga varðan

**Føroya Heimavirkisfelag hevur gjørt film um, hvussu ull verður virkað í Føroyum**

FILMUR
*Turið Kjølbro*

Hvørt land hevur egna siðvenju, alt eftir ráevni tey hava at arbeiða við. Í Føroyum hevur tað verið seyðurin og ullin. At varðveita gamlar heimavirkissiðir er eitt endamál hjá Føroya Heimavirkisfelag. Tí hevur felagið tikið stig til at gera ein film um føroyska siðvenju innan ull og ullarvirking saman við Nicolinu Jensen Beder, handarbeiðslærara. Filmurin kom út á 15 ára stovningardegi felagsins, sum var 28. mai. Í hesum sambandi varð Nicolina Jensen Beder, sum hevur skrivað handritið til filmin og eigur leiklutin í filminum, heiðrað við heiðursbrævi.

Nicolina Jensen Beder er útlærd handarbeiðslærari frá Haslev Haandarbejdsskole í 1950 og hevur tikið terminskeið í tekstillæru, siðsøgu, brodering og veving á Säterglänten, Hemsløjdens Gård í Svøríki - avlærd við próvbrævi í 1978. Tey seinastu 25 árini hevur hon burtur av undirvíst í føroyskari siðvenju innan ull og spuna og í øðrum gomlum arbeiðsháttum. Áhugin fyri øllum, sum hevur við ull og seyð at gera, hevur leitt hana á kunningarferðir í flestu Norðurlondum. Nicolina hevur millum annað saman við Føroya Fornminnissavni staðið fyri fleiri framsýningum og hevur hildið fyrilestrar um ull og spuna runt um í Norðurlondum og í USA.

Arbeitt hevur verið við filmsverkætlanini síðani 1999. Árni Conradsson og Zacharis Hammer hava framleitt filmin, sum hevur fingið stuðul, bæði alment og privat. Tónleikin til filmin hevur Martin Joensen gjørt, og Ívar Iversen, fyrrverandi útvarpsmaður, lesur tann siðsøguliga partin.

Øll arbeiðsgongdin í sambandi við ullarvirking verður lýst í filminum við orðum og myndum. Byrjað verður á várgongu, tá ið seyðurin verður royttur og ullin vaskað, og endað verður við tógvroyndum og lidnum pløggum.

Upptøkur eru gjørdar í roykstovuni í Hoyvíksgarði og í Dúvugørðum. Filmurin, sum er slakar tveir tímar langur, er ætlaður sum frálærutilfar, men er avgjørt áhugaverdur hjá øllum, ið hava áhuga fyri eldri mentan.



*Nicolina Jensen Beder hevur skrivað handritið til filmin*




*Kápumynd av filminum*



# Hugnaðu sær

**At kalla fullsett flogfar við fótbóltsáskoðarum fór til Danmarkar hóskvøldið. Áskoðarar sum ætla sær at síggja Toda Jónsson gerast danskan meistara í fótbólti**

FÓTBÓLTSFERÐ
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen*

Annað árið á rað verður eitt slag av føroyskari innrás í Danmark, nú superligan stendur fyri seinastu leikumførunum í hesum kappingarárinum. Í fjør vóru tað Jákup Mikkelsen og Herfølge, sum tóku øll á bóli, og í ár eru tað Todi Jónsson og FCK, sum skapa ans og gleði millum fótbóltshugaðar føroyingar.

Í mun til í fjør, tá tað kanska serliga vóru klaksvíkingar, sum leitaðu sær niður, so er áskoðarafjøldin hesa ferð meira spjadd yvir landið. Møguliga sum ein avleiðing av ferðatilboðnum frá Atlantic, har ferðafólk fyri tveir túsundkrónuseðlar kundu fáa eitt vikuskifti i danska høvuðsstaðnum, umframt at tey eisini kundu fara til fótbólt.

## 12. maður er við

Ein teirra, sum er við í ferðalagnum, er formaðurin hjá 12. manni, Regin Egholm. Onnkursvegna ein rættiliga serstakur fótbóltsáskoðari, tí meðan hann lítið og einki hyggur at heimligu kappingini, so er Regin fastur fúsur til landsdystir, og fer hann nú eisini til avgerandi dystirnar hjá FCK.

Tá vit umborð á flogfarinum spurdu hann, hvørt hann kanska er eitt serligt slag av áskoðara, sigur Regin, at tú er hann kanska.

- Tað kanst tú væl siga. Í Føroyum dømi eg at kalla hvørt vikuskifti, og tí eru tað slettis ikki stundir at hyggja at fótbólti. Teir dystirnar, sum vit døma, sær mann sjálvsagt við øðrum eygum, og tí er tað helst ein øðrvísi háttur at sýna áhuga, at mann so hevur kastað sín als á landsliðið ístaðin fyri.

## Ikki fyrstu ferð

Hendan ferðin snýr seg tó ikki um landsliðið, og eftir avboðið hjá Toda herfyri, so snýr hon seg heldur ikki um ein landsliðsleikara, men hetta tykist tó ikki á nakran hátt at hava tikið nakað av áhuganum hjá Regini burtur.

- Nei, tað haldi eg ikki, at mann á nakran hátt kann revsa Toda fyri. Eg skilji hansara avgerð, og hóast tað sjálvsagt er keðiligt, so mugu vit bara góðtaka tað.

- Hinvegin slepst ikki uttan um, at Todi allar helst er Føroya besti fótbóltsspælari, og tí haldi eg so avgjørt, at vit eiga at bakka hann upp. Hann hevur við FCK møguleikan at gerast danskur meistari, og hóast hann ikki er hin fyrsti at verða tað, so er hetta kortini ein stór hending fyri Føroyar.

Regin leggur annars afturat, at hetta so langt ífrá er fyrsta ferðin, at hann er í Keypmannahavn og hyggur at FCK.

- Eg havi verið til fleiri aðrar dystir hjá teimum, men hetta er kortini fyrsta ferðin, at eg bara eri farin at hyggja. Áðrenn hevur tað aloftast verið so, at eg havi skula nøkur ørindi í Danmark. Havi so roynt at lagt alt til rættis, soleiðis at eg eisini havi kunna sæð FCK spælt. Millum annað var eg í Parkini hin minniliga dystin í '96, tá Todi fyri fyrstu ferð royndi seg móti Brøndby. FCK vann dystin 4-1, og Todi skoraði týdningarmikla 3-1 málið við at lobba upp um Mogens Krogh. Eitt mál, sumk seinni hetta árið varð mett sum besta mál á árinum.

## Bara áskoðari

Sum omanfyri nevnt, so er hetta fyrsta veruliga fótbóltsferð til dyst hjá FCK. Regin hevur tó sjálvandi áður verið til landsdystir, har hann sum fyrireikari so avgjørt hevur havt nokk at takast við. Tá vit at enda spurdu Regin, hvat ann væntar av hesari ferðini, sigur hann, at tað veit hann sum so ikki.

- Tað einasta eg ætli mær at gera hesaferð, er at hyggja at fótbólti. Hvat annað so hendir, hugsi eg ikki so nógv um. Hetta er fyrsta ferð, at eg sleppi at vera áskoðari, og tað er so tað, sum eg ætli mær at vera, sigur Regin Eghom at enda.



*Flogfarið var fullsett hóskvøldið, og fyri tað mesta var talan um fótbóltsáskoðarar, sum skuldu til danska høvuðsstaðin*



*Jákup í Stórustovu, sum rekur North Atlantic Football Agency, hevur saman við Atlantic Airways skipað fyri ferðini til dystin millum FCK og Brøndby*



*Hesa ferð kann Regin gloyma alt annað, og bert hugsa um at síggja ein góðan fótbóltsdyst*


## Starvsfólk til Fíggjardeildina

"Tað er annað til í verðini enn pengar. Til dømis kekkar og kreditkort..."
*Ókendur*



Til okkara Fíggjardeild verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. september 2001 ella skjótast gjørligt.

Í Fíggjardeildini starvast 4 fólk. Uppgávurnar hjá tí, sum settur verður, vera í fyrstu atløgu at gera uppgerðir, avstemningar og eftirlitsarbeiðið í samband við mánaðarroknskapir, ársfjórðingsroknskapir og ársroknskapir eins og at luttaka í sjálvum roknskaparabeiðinum. Saman við hinum starvsfólkunum í Fíggjardeildini verður tú eisini við í menningini av niðanfyri standandi uppgávum:

- ársroknskapi og øðrum tíðarskeiðsroknskapum
- budgettum, budgettuppfylging v.m. gjaldførisuppgerðum
- viðlíkahaldi av annleggskartoteki, herundir uppfylging av íløgum
- uppfylging av tryggingum
- ger av skrivligum mannagongdum v.m.
- ymsum ad hoc uppgávum

Vit kunnu bjóða tær at starvast í einum mennandi og avbjóðandi umhvørvi.

**Útbúgving og førleikar hjá umsøkjarum:**
Tann, sum settur verður, skal hava góðan kunnleika og royndir innan bókhald og/ella roknskaparabeiði frá líknandi starvi ella frá grannskoðara. Eisini er tað fyrimunur, um viðkomandi hevur

- hollan EDV-kunnleika
- góð samstarvsevnir
- evnir at arbeiða sjálvstøðugt

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag ella samsvarandi kvalifikatiónunum.

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Joensen, fíggjarstjóra, tel. 303297 ella starvsfólkadeildina tel. 303030.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. juni 2001.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

Tel 303030, fax 303031, www.tele.fo

Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt og hetta setur stór krøv til fyritøku og starvsfólk. Vit søkja tí eftir skikkaðum fólki, sum vilja verða við til at gera tað stuttligt at venda sær til Føroya Tele.

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*